# Stanley Samuelsen á International Folk Festival í Litava

Farnu vikuna hevur Stanley Samuelsen spælt seks væl vitjaðar konsertir í Litava, nakrar í høvuðsstaðnum Vilnius men eisini í Varena og Pavalys.

Hetta er á fjóra sinni, at man heldur International Folk Festival í Litava, og festivalurin er væl umtóktur millum fólkið

Í ár luttóku tónleikarar úr teimum trimum baltisku londunum, úr, Føroyum, Noregi, Svøríki, Finlandi, Írlandi, Onglandi, Spania og Ukraina.

Stanley luttók eisini í 2003 og 2004. Aftur í ár var tað serliga føroysku løgini hjá Stanley, ið vóru á skránni, men á festivalinum er eisini nógv samspæl. Og tí bar til at uppliva Stanley saman við m.ø. svensku Evu Samuelson og norska Olafi Stenstad. Saman spældu tey ein kendan litaviskan sang, og áskoðararnir sungu væl við á konsertini í St.Catherines Church í Vilnius.

Eisini spældi hann saman við íranum Denis McLaughlin ongilsmanninum Julian Dawson, ið saman við Stanley spældi eina Beatles konsert fyri vælnøgdum áhoyrarum.

**- nud**


Starvslýsing

## Nærverkið Heimatænastan

### Avloysari fyri heilsurøktara til Heimatænastuna í Eysturoynni

Søkt verður eftir avloysara fyri heilsurøktara í barnsburðarfarloyvi í tíðarskeiðnum 1. februar til 31. august 2007.

Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan til borgarar á eldrasambýlinum Vesturstovu í Fuglafirði, sum er eitt eldrasambýli við 14 búfólkum. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar innan Heimatænastuna.

**Førleiki**

- Prógv sum heilsurøktari ella aðra viðkomandi útbúgving
- Fakligan áhuga fyri primera økinum
- Fleksibilitetur
- Góð samstarvs- og samskiftisevni

**Setanarviðurskifti**
Arbeiðstíðin er 32t/viku í skiftandi dag-, kvøld- og náttarvaktum. Setanartíðin er 1. februar 2007 til 31. august 2007.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Nærverkið við fyribils tænastustað í Heimatænastuni í Eysturoynni.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til økisskrivstovuna á tlf. 449249 og tosa við Eyðnu Justinussen, varaleiðara.

**Umsókn**
Send eina umsókn við prógvi v.m. til:

Nærverkið
Heimatænastuni Eysturoy
Økisskrivstovan, Heilsumiðstøðin
Postboks 47
610 Saltangará

**Umsóknarfreistin er 16. november 2006.**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

samsit.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**


# Hetlendskur punktónleikur at hoyra um vikuskiftið




*Bacchus in action!!!*

**Í hesum døgum vitjar ein hetlendskur punkbólkur í Føroyum. Kristian Blak og hetlendingurin David Kok skipaðu fyrr í ár fyri einari rokkkonsert í Hetlandi. Tá vóru tað føroysku Paradox sum saman við hetlendska Bacchus spældu kring oyggjarnar sunnanfyri okkum. Tá riggaði tað sera væl, og Kristian og David sóu beinanvegin, at hetta var vert at gera umaftur. Nú er bólkurin Bacchus í Føroyum. Bacchus skal spæla tríggjar konsertir í Føroyum**

LÍTIL KONSERTFERÐ

*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Bacchus kann metast at verða tað hetlendska 200 (um ein kann siga so). Limirnir siga, at teir eru teir einastu punkarirnir í Hetlandi, og teir eru ikki bangnir fyri at siga sínar hugsanir. Tónleikurin er ráur og ópoleraður. Tekstirnir eru samfelagsrevsandi og snúgva seg um at "reisa seg" og eru generelt illir. Tónleikurin er týttur og stuttligur at lurta eftir. Eg ivist ikki í, at hetta er ein bólkur sum skal hoyrast "live". Tey sum vilja fáa meir at vita um bólkin Bacchus, kunnu leita sær inn á teirra myspace-profil sum er:
www.myspace.com/bacchus3

### Føroyskt ískoyti

Paradox fer eisini pallin somu kvøld sum Bacchus. Paradox er ein serstakliga vælumtóktur bólkur millum ungdómin í Føroyum, og plagar at leverað super góðar konsertir. Teir hava ikki spælt konsert síðan august mánað, so limirnir eru serliga tendraðir til hesa lítlu konsertferð, skilja vit. Eisini hevur bólkurin fingið nýggjan trummuleikarar, so tað verður spennandi at hoyra hvussu teirra tónleikur fer at ljóða við hesari samansetingini.

Okkum nýtist ikki siga so nógv um Lama Sea. Hetta er ein av okkara bestu bólkum, og mong eru tey, sum roki við onkrum stórum frá teimum. Umframt at spæla væl, so er Lama Sea eisini ein góður bólkur at hyggja at. Limirnir eru sera energiskir á pallinum, og duga teir væl at liva seg inn í tónleikin.

Konsertirnar við Bacchus verða soleiðis:

Fríggjakvøld 27.10.2006 í Kagganum saman við Lama sea og Paradox

Leygarkvøld 28.10.2006 í Bryggjuni í Vestmanna saman við Lama Sea og Paradox

Sunnukvøld 29.10.2006 í Margarinfabrikkini. Enn er ikki vist hvørjir bólkar spæla við tá


## ÚTBJÓÐING AV REINGERÐARARBEIÐI



Løgmansskrivstovan bjóðar við hesum út dagligu reingerðina av Sjó- og vektarbúðini, har Løgmansskrivstovan heldur til.

Gólvvíddin er til samans 751 fermetrar í fýra hæddum. Hvør hæddin er millum 168 og 210 fermetrar. Í húsinum eru sekstan skrivstovur, fýra vesi, tríggjar gongir, eitt fundarrúm, umframt onnur smærri rúm.

Arbeiðið umfatar dagliga reingerð og árliga høvuðsreingerð, og sáttmálatíðin er frá 1. desember 2006 til 30. november 2007.

Tilboðini skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. november 2006 og kunnu sendast við teldubrævi til Barbaru á Tjaldrafløtti, deildarstjóra, bat@tinganes.fo, ella við vanligum brævi til Løgmansskrivstovuna, Postrúm 64, 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan: Reingerð.

Er eitthvørt at spyrja um, ber til at ringja 551040 ella skriva til Barbaru á Tjaldrafløtti, deildarstjóra.

www.samsit.fo

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office